Dagf. 27. februar 2025
HMR j. nr. 25/05226-3

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-085/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um sølu av handkeypsheilivági í øllum handlum, frá Jørgeni Niclasen, løgtingsmanni

Spurningur:

1. Ætlar landsstýriskvinnan at arbeiða fyri, at hondkeypsheilivágur kann keypast í øllum handlum?

Svar:

Í sambandi við at løgtingslóg um heilivág er til viðgerðar í Løgtinginum, hevur alment kjak tikið seg upp um, at atgongdin til handkeypsheilivág skal gerast lættari fyri brúkararnar. Í hesum sambandi er eisini víst á møguleikan at loyva sølu av handkeypsheilivági í øllum handlum.

Ein skipan, har tað verður loyvt øllum handlum at selja handkeypsheilivág, er ikki partur av endamálinum við lógaruppskotinum og tí eru heldur ikki gjørdar greiningar av, hvussu ein tílík skipan kann virka í praksis við umsiting, eftirliti, ráðgeving og annað.

Hóast tað at lætta um atgongdina til handkeypsheilivág ikki hevur verið partur av endamálinum við lógaruppskotinum, fer landsstýriskvinnan at arbeiða fyri at tryggja lættari og javnbjóðis atgongd til handkeypsheilivág í Føroyum. Hetta málið skal náast við, at borgarar fáa atgongd til handkeypsheilivág umvegis ávikavist apotek, sjálvtøkur og handkeypssølur, hóast talan ikki verður um allar handlar.

Við sjálvtøkum kring landið, hava viðskiftafólk atgongd til handkeypsheilivág frá apotekinum allar tíðir á samdøgrinum alt árið. Harumframt hava viðskiftafólk møguleika at keypa handkeypsheilivág í sambandi við avbjóðingar, sum viðskiftafólkið kann uppliva sum viðkvæmt at deila við eitt avgreiðslufólk á apotekum ella í handlum. Sjálvtøkurnar eru knýttar at Skjáttuni hjá Talgildu Føroyum, sum hava tann fyrimun, at tað tryggjar at einans persónar, sum eru fyltir 18 ár og eldri, kunnu keypa í sjálvtøkunum.

Fyrsta sjálvtøkan í landinum varð tikin í nýtslu í fjør. Apoteksverkið hevur góðar royndir við hesi sjálvtøkuni, sum er uttanfyri Tjaldurs apotek í SMS. Í sjálvtøkuni ber til at keypa handkeypsheilivág alt samdøgrið. Hetta hevur verið við til at gera tænastuna í økinum betri og smidligari.

Uttanfyri nýggja apotekið í Vágum verður ein sjálvtøka sett upp. Hendan verður tikin í nýtslu, tá ið apotekið letur upp í vár. Tvær aðrar sjálvtøkur eru bílagdar, sum verða settar upp uttanfyri apotekini í Klaksvík og Runavík.

Seinni í ár verða eisini sjálvtøkur settar upp uttanfyri apotekið á Tvøroyri, umframt á Landssjúkrahúsinum.

Afturat teimum fýra apotekunum, søludeildini í Steinatúni og sjálvtøkunum, eru í løtuni 19 handkeypssølur runt landið. Handkeypssølurnar eru í økjum, har einki apotek ella sjálvtøka er og hava úrval av handkeypsheilivági, sum er nógv eftirspurdur.

Arbeitt verður framhaldandi við at gera tænastuna betri. Apoteksverkið endurskoðar regluliga atgongdina til handkeypsheilivág í Føroyum og ger metingar um, hvar tørvur er á at hava ávikavist apotek, sjálvtøkur og handkeypssølur, soleiðis at tað áhaldandi verður tryggja øllum føroyingum lætta atgongd til handkeypsheilivág.

Heilsumálaráðið, 27. februar 2025

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna